**NUMMAR.** Fleiri og fleiri fólk leita eftir telefonnumrum á internetinum. Leitisíðan www.nummar.fo hevur eftir stuttari tíð vunnið fram sum ein tann mest nýtta føroyska heimasíðan

# Gev mær eitt nummar




**Vanlig telefonbók ella internet. Fleiri og fleiri føroyingar leita eftir telefonnumrum á internetinum, har Teleforlagið seinasta hálva árið hevur havt telefonbókina liggjandi. Hendan telefonbókin verður dagførd einar 10 ferðir um árið. Mynd: Álvur Haraldsen**

*Eyðun Klakstein*

Fleiri og fleiri føroyingar nýta internetið, tá teir skulu leita eftir upplýsingum um eitthvørt evni.

Soleiðis er eisini, tá talan er um upplýsingar um telefonina.

Lívið er eitt nummar, syngur onkur, og á internetinum er tað eisini ein síða við numrum, sum hevur vind í seglinum í hesum døgum.

Leitisíðan www.nummar.fo hjá Teleforlagnum hevur eftir stuttari tíð vunnið seg fram sum ein tann mest nýtta føroyska heimasíðan.

Og roknað verður við, at um eini fýra ella fimm ár verður ikki neyðugt at geva út eina vanliga telefonbók. Tá fara fólk at leita eftir telefonnummrum á internetinum ella á annan hátt.

Teleforlagið legði telefonbókina á internetið í august mánaði í fjør, og fyrstu tíðina vóru um 350 brúkarar á síðuni um dagin. Hetta eru ymiskir brúkarar, tí ein brúkari verður bara skrásettur eina ferð, hóast hann er fleiri ferðir inn á heimasíðuni um dagin.

Í dag er talið vaksið til 1210 brúkarar í miðal um dagin. Gerandisdagar eru ofta um 1500 ymiskir brúkarar, meðan tað eru færri brúkarar um vikuskifti, tá flestu stovnar og virki eru afturlatin.

Síðani www.nummar.fo fór at virka fyri sjey mánaðum síðani, hava 1,4 milliónir sokallað hits verið á heimasíðuni. Hvørja ferð onkur fer inn á síðuni, er tað eitt hit.

**Størri møguleikar at leita**

Tað eru eyðsýndir fyrimunir við telefonbókini á internetinum sammett við tað prentaðu útgávuna.

Telefonbókin á internetinum verður dagførd einar 10 ferðir um árið, og tað hevur við sær nýggjari og neyvari upplýsingar um telefonfelagar í landinum.

– Tað eru eisini nógv fleiri møguleikar at leita í telefonbókini á internetinum, enn tað eru í vanligu telefonbókini. Tað ber til at leita upp á nøvn ella partar av nøvnum, telefonnummur, gøtunøvn, bygdir og so víðari, sigur Jens Pauli G. Nolsøe, sum er leiðari av Teleforlagnum.

Men hóast stóru undirtøkuna fyri telefonbókini á internetinum, verður nýggj telefonbók borin út kring landið í hesum døgum.

– Vit ætla okkum at gera vanligu telefonbókina, so leingi sum brúk er fyri henni. Tey, sum ikki hava teldu ella internet, skulu hava sama møguleika at leita eftir telefonnumrum, sigur Jens Pauli G. Nolsøe.

Teleforlagið hevur júst prentað 40.000 nýggjar telefonbøkur, sum Postverkið fer at fáa út til brúkararnar. Tele Danmark hevur mett, at um eini fýra ella fimm ár fara teir at gevast at gera vanligar telefonbøkur, og hesin útviklingur kemur eisini til Føroya.

Umframt vanligu telefonbókina, nummarkall og internetið ber eisini til at leita eftir telefonnumrum á fløgu, sum Teleforlagið gevur út. Nýggj og dagførd fløga kemur út í mai mánaði.

**Mest tað einfalda**

Tað eru nógvir leitimøguleikar í telefonbókini á internetinum. Tað ber til leita eftir einum telefonnummari, um tú hevur gloymt navn, men kennir adressuna hjá viðkomandi, tú skalt hava fatur á.

Tað ber eisini til at leita upp á gøtunøvn ella partar av gøtunøvnum, og tað ber eisini til at avmarka leitingina til einstakar bygdir. Í vanligu telefonbókini eru sjey øki at leita í, men á internetinum ber til at býta landið í enn smærri partar.

– Hóast nógvir ymiskir leitimøguleikar eru, brúka fólk mest tí einføldu leitingina, har tey leita eftir einum telefonnummari, ella eftir hvør stendur fyri einum telefonnummari, sigur Jens Pauli G. Nolsøe.

– Telefonbókini á internetinum hevur verið ein fyrimunur fyri okkum, sum standa fyri telefonbókini, tí fólk kunnu altíð fara inn á ww.nummar.fo og kanna eftir, at allar upplýsingar eru í lagi. Um broytingar skulu gerast, kunnu fólk senda okkum tær, og tað eru tað nógv sum gera leypandi.

Hesar upplýsingar verða dagførdar á internetinum, meðan vanliga telefonbókin hevur longri livitíð við somu upplýsingum.

– Vit hava eina hóming av, at brúkararnir eru glaðir fyri okkara tænastu á internetinum, sigur Jens Pauli G. Nolsøe.

At upplýsingar um telefonnummur liggja á internetinum ger, at øll hava atgongd til hesar upplýsingar, eisini fólk í útheiminum. Og tað eru helst bæði fyrimunir og vansar við hesum.

– Fólk avgera sjálvi, um tey vilja vera við í telefonbókini. Hava tey ikki hug til tað, kunnu tey fáa dult nummar, sigur Jens Pauli G. Nolsøe.

Men flestu føroyingar velja at standa í telefonbókini. Í løtuni eru knapt 50.000 felagar í Føroyum.





**Morgun í einum kjallara í Nólsoy. Fjúrtan ára gamli Tommy Andreasen ger seg til reiðar til dagin, ið hevur nógv spennandi at bjóða.**

Mynd: Jens Kristian Vang

# Góðan morgun, Nólsoy!

**DREINGJALÍV.** Fjúrtan ára gamli Tommy Andreasen í Nólsoy er ein rokari av rang. Lærubøkur og lestur liggja honum fjart frá. Mjólking, egning og elektronikkur hava størri áhuga. Hóast unga aldurin hevur hann sjálvstøðugar meiningar um lívið, leti, brennivín og baptistar

*Høgni Mohr*

Vanligar dagar er hann uppi um hálvgum átta tíðina. Men sáttmálatrætan á frálæruøkinum hevur við sær, at hann í morgun lovar sær at liggja ein tíma longur.

Tommy Andreasen er fjúrtan ára gamal, føddur 9. november 1985. Hann gongur í Nólsoyar Skúla. Men hann er ongin vanligur skúladrongur. Tað sæst longu inni á kamarinum, tá ið vit purra hann út hendan týsmorgunin.

Millum russiskar vimplar á bróstinum hanga samuraisvør, hvalvákn, sóknarongul og myndir av Harley Davidson og Manchester United. Á gólvinum standa seyðastavur og gittari. Og hillarnar eru á tremur við tómum Viskifløskum av tí fínara slagnum, Five Star Old Smugler, Whyte Mackayes og His Eminences Choise.

Tommy býr hjá mommuni og pápanum í býlinginum, Nýggjagarði, í Nólsoy, og er elstur av trimum systkjum. Systrarnar báðar eru níggju og fimm ára gamlar. Foreldur eru Poli og Jóhanna. Í bygdini hevur Tommy bæði ommu, abba og langommu og langabba.

– Okkurt av tí er nøkur og hálvfems, sigur Tommy so hissini.

Pápin er klaksvíkingur, men Tommy sigur seg ongan kenna í Klaksvík. Heimurin hjá Tommy er Nólsoy.

**Noyddur í skúla**

Fyrst á skránni á degnum er skúlagongdin. Skúlin í Nólsoy fær góð skoðsmál frá rokaranum í áttanda flokki. Men viðhvørt kann tað vera eitt sindur leiðiligt at síggja andlitini á somu lærarum, hvønn morgum. Og í roynd og veru tímir Tommy illa at ganga í skúla. Hann vil heldur arbeiða.

– Eg hevði viljað hildið upp at í áttanda og so farið at lært til elektromekanikara. Men eg *skal* ganga nígginda, sigur Tommy, ið metir seg sjálvan vera ein meðalnæming. Hann fær vanliga sjey- og áttatøl. Tað er hann nøgdur við.

Heimaarbeiði ger hann altíð. Annars kemur hann illa fyri morgunin eftir og verður revsaður við referatskriving.

**Pápin arbeiðir harðast**

– Tey eru okey, heldur Tommy fyri, tá ið hann verður spurdur um foreldrini. Pápin er sjómaður; siglir við vaktarskipinum, Gormi. Momman arbeiðir sum skrivstovukona hjá Tummasi Dam í Havn.

– Tey eru eitt sindur strong, haldi eg. Serliga við skúlanum. Tey vilja hava meg at fáa betur karakterir. Helst tíggjutøl, tí tað gevur meira møguleikar.

Í hugaheimi Tommy, er tað pápin, ið arbeiðir meira enn momman. Hann heldur tað vera harðari arbeiði at vera til skips, enn at sita á skrivstovu og trýsta á knappaborðið.

*Men, tað ið momman ger í heiminum, tá ið pápin er burtur, er tað ikki arbeiði?*

– Jú, men tað er ikki so hart...

Annars heldur sonurin, at hann sleppur at gera tað hann hevur hug til. Hóast tey grenja eitt sindur viðhvørt.

– Serliga tá ið eg eri seinur til húsa um kvøldarnar, sigur hann.

Foreldrini eru ikki tey einastu, ið arbeiða heima. Eisini Tommy tekur eina hond í.

– Tá ið babba ikki er heima, og okkurt fer, so geri eg tað aftur, sum eg dugi. Koma septiktangamenninir, so eri tað eg, ið gravi frá. Ella loysnar okkurt, so má eg negla tað fast aftur, leggur hann afturat.

**Fyrimyndir og politikkur**

Fyrimyndirnar kunnu vera so mangar, tá ið ein er fjúrtan ára gamal. Men Tommy hevur ikki nógvar. Hvørki hetjur sum Ova Joensen, sála, ella pápan, Pola.

– Pápin siglur, og bara eg *síggi* sjógvin, so spíggi eg. Tá ið Ritan er í tungari aldu er heilt galið.

– Ovi er bestemt ikki nøkur fyrimynd hjá mær. Hann var ein maður, sum allir aðrir, og annars minnist eg hann ikki; eg var bara eitt ár.

Eisini politikarir eru luft fyri Tommy.

– Um teir doyggja ella liva; tað er líkamikið fyri meg. Eg tími bara ikki at lurta eftir hasum fjasinum og kjarrinum hjá teimum...

Um góð trý ár hevur Tommy valrætt. Men hvar hansara krossur endar, veit hann ikki. Og hann veit heldur ikki, hvønn foreldrini velja.

Um fullar tingmenn hevur hann lítið at siga.

– Eg las okkurt um tað, men eg haldi, at tað munnu teir um. Tey, sum hava hug at blanda seg upp í tað, munnu gera tað; eg geri tað so ikki. Og fullveldi er líka mikið fyri meg. Nólsoyggin flytur seg so ongan veg!

Nei, Tommy hevur ongar hetjur. Men hann lurtar og lúrir av fólk, ið gera okkurt sjónligt til nyttu.

**Í skúri**

Tá ið ein kjansur er, fer Tommy í egningarskúrin, ið hoyrir til útróðrarbátin, Anniku. Hann fær 90 krónur fyri stampin. Og hann klárar

*framhald á næstu síðu*